

Myndir: Álvur Haraldsen

# Neistin snávaði í grannauppgerðini

**HONDBÓLTUR Kvinnurnar hjá Neistanum snávaðu ímóti grannunum úr Kyndli, men varðveita kortini oddasessin framman fyri næstu liðini, Tjaldur og Stjørnuna vunnu sínar dystir í gjár**

Hilmar Jan Hansen

Neistin, sum hevur spælt ein dyst meira enn Tjaldur og Stjørnan, hevði í gjár gyltan møguleika at halda fast um oddasessin í Sunsetkappingini og munin niður til hini bæði. Men í grannauppgerðini ímóti Kyndli snávaði Neistin, tí tær grønu strídd-ust so væl, at úrslitið gjørdist javnleikur 16-16.

Á heimavølli í Klaksvík eydnaðist Stjørnuni at reisa seg eftir eyðmýkingina í Vági sunnudagin, tá VB vann við heilum átta málum. Hesa ferð hevði Stjørnan vitjan av VÍF og vann ein tryggan 29-20 sigur, ið ger, at Stjørnan nú er tvey stig aftan fyri Neistan og eitt aftan fyri Tjaldur.

Tjaldur hevði stutta leið til útidystin hesa ferð, tí hann var á Skála ímóti StÍF. Úrslitið gjørdist, at Tjaldur vann 30-23, og hetta var samstundis tíggjundi sigurin hjá teimum gulu úr Runavík, síðani Trygvi Mortensen tók við sum venjari fyri tveimum mánaðum síðani.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Klassamunur

**HONDBÓLTUR**

**Neistin vann greitt við 14 málum í grannauppgerðini móti Kyndli í gjár**

Uni Holm Johannesen



Tað var lítið veiggj í Kyndli í grannauppgerðini í høllini á Hálsi í gjár. Seinastu løtuna var tað eyðmýkjandi fyri grønu havnarmenninir, tá Nestin fekk seks mál upp í slag, og munurin varð heili 14 mál.

Neistin vann 37-23.

Kyndil rann aftaná frá fyrsta bríksli. Neistin var á odda við seks málum eftir seks minuttum, og tá var munurin longu so stórur, at Kyndil kláraði ikki at hótta leiðsluna.

Áki Mørk og Finnur Hansson, Neistin, vóru toppskjúttar við átta málum hvør. Andrias Sólsker skeyt flest mál fyri Kyndil. Hann fekk fimm mál.

uni@sosialurin.fo




# Steypafinalan verður í Klaksvík

**FÓTBÓLTUR Stendur tað til Fótbóltssambandið verður steypafinalan aftur spæld á Summarfestivalinum í ár. Tað er staðfest í dystarskránni, sum er sent feløgunum til hoyringar**

Uni Holm Johannesen

Finalan í kappingini um Løgmanssteypið verður spæld tann 5. august. Vøllurin á Djúpumýru í Klaksvík verður karmur um dystin.

Tað leggur Fótbóltssambandið upp til í dystarskránni, sum er sent feløgunum til hoyringar.

### Fekst ikki semja

Tað fekst ikki semja í fjør millum Fótbóltssambandið og Tórshavnar kommunu um, hvussu nógv tað skuldi kosta Fótbóltssambandinum at brúka ovara vøll í Gundadali á ólavsøku.

Ósemjan snúði seg um, at Tórshavnar kommuna vil hava 100.000 krónur fyri at lata ovara vøll í Gundadali til steypafinaluna á ólavsøku. Tað var FSF ikki sinnað at rinda.

Klaksvíkar býráð vendi sær til Fótbóltssambandið við einum tilboði um, at finalan varð spæld í Klaksvík. Semja var um, at steypafinalan varð spæld á Summarfestivalinum, og at einki tónleikatiltak varð, meðan finalan varð spæld.

Tað eydnaðist sum heild væl.

### Verður í Klaksvík

Sunniva Kollslíð, kappingarleiðari í FSF, hevur uppskotið til dystarskránna um hendi. Hon var ikki at hitta fyrrapartin, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Men uppskotið hjá Fótbóltssambandið leggur upp til, at steypafinalan verður spæld fríggjadagin tann 5. august. Tað stendur ikki, at dysturin verður í Klaksvík, men tá Summarfestivalurin er í døgunum frá 4. til 6. august, er sera sannlíkt, at FSF letur klaksvíkingar standa fyri dystinum aftur í ár.

Tað stendur eisini í dystarskránni, at spælafinalan verður møguliga spæld tann 20. august. Orsøkin er helst, at um Summarfestivalurin og býráðið í Klaksvík ikki vilja hýsa steypafinaluni, verður dysturin fluttur góðar 14 dagar fram. Tað tykist hinvegin lítið sannlíkt, tí klaksvíkingar stórfegnaðust um tiltakið í fjør.

uni@sosialurin.fo

# Slagið um Havnina á seinasta leikdegi

**Eins og í fjør, leggur dystarskráin hjá Fótbóltssambandinum upp til, at B36 og HB hittast á seinasta leikdegi**

Uni Holm Johannesen

Dystarskráin er send feløgunum til hoyringar, men uppruna uppskotið plagar oftast at líkjast endaligu skránni.

Tað er alt sum bendir á, at slagið um høvuðsstaðin verður á seinasta leikdegi. Soleiðis var eisini í fjør, tá HB tryggjaði sær føroyameistaraheitið.

uni@sosialurin.fo